# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

**FAKTA**

| Mazda BT-50 4x4 | |
|---|---|
| **Motorurin** | 2,5-litur 4 syl turbodiesel 143 hk v.common-rail innspræning |
| **0-100 km/t** | 11,9 sek. |
| **Oljunýtsla** | 8,9 km/l (blandað koyring) |
| **Dekkstødd** | 215/70-15 |
| **Stødd og vekt** | |
| **Longd** | 507,5 cm |
| **Breidd** | 180,5 cm |
| **Hædd** | 162,0 cm |
| **Lastar** | 1.118-1.172 kg |
| **Prísur** | Kr. 217.000,- ( Regular Cab ) |
| **Søluumboð** | Bilasølan<br>Vegurin Langi<br>FO 188 Hoyvík<br>Tel. 359700<br>www.bilasolan.fo |

# Mazda BT-50 komin

**Mazda BT-50 4x4, sum vit herfyri roynadarkoyrdu í Athen í Grikkalandi, er nú komin til landið. BT-50 fæst í fýra ymiskum útgávum: Regular Cab, Freestyle Cab, Double Cab og sum ”chassis” til trælast e.l.**




*Fróði Clementsen, sølumaður hjá Bilasøluni, við nýggja Mazda BT-50*

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Mazda B2500 er nú avloystur av BT-50, ið er ein heilt nýggjur nútímans pickup. B-serian hjá Mazda, ið hevur røtur heilt aftur til 1961, er kend fyri haldbarheit og slitstyrki sum arbeiðsbilar hjá t.d. handverkarum og bóndum. Bilar sum koyra uttan trupulleikar. Hesin nýggi BT-50 vendir sær bæði til vinnuna og til teirra sum ynskja sær ein ektaðan 4x4.

BT-50 er ein ”rættuligur offroadari”, ið lastar nógv, orkar væl at draga og kann koyra allastaðni. Bilurin er flottur og stílfullur og riggar væl við eykaútgerð sum t.d. boylum, gáttum o.s.fr. Til Freestyle Cab og Double Cab ber til at keypa sokallaða Sumo-pakkan við t.d. alufelgum, kromaðum síðuspeglum, hurðahandtøkum, trinbrettum og tokulyktum.

Motorurin er heilt nýggjur. Talan er um ein 2,5-litur common-rail turbodiesel v. “intercoolara” og 143 hk. Motorgongdin er bleyt og ljóðleys. Ein kvikur og orkusparandi motorur, sum koyrir frá 0-100 km/t upp á einans 11,9 sekund. Snúningsmometið er upp á 330 Nm.

Mazda BT-50 er ein av „svervektarunum“ í sínum klassa. Í teimum ymisku útgávunum (alt eftir hvussu stór lastin er), lastar hann millum 1.118 og 1.172 kg, og kann draga ein viðfestisvogn, sum vigar upp til 3 tons.

## Fýra ymiskar útgávur

Innan er BT-50 sum ein vanligur persónbilur. Allar útgávurnar hava sum standard t.d. airbag, el-síðurútar, el-síðuspegl, sentrallás, hita í setrunum og radio við fløguspælara og møguleika til MP3-spælara. Allar útgávurnar hava 4x4 system við reduktiónsgiri.

BT-50 fáast í fýra ymiskum útgávum: Regular Cab, Freestyle Cab, Double Cab og sum ”chassis” til trælast e.l. (bert til Regular Cab).

Regular Cab 4x4 er tann bíligasti við minstu kabinuni við tveimum síðuhurðum og longstu lastini upp á heilar 2.280 mm. Freestyle Cab 4x4 hevur størri kabinu og fýra síðuhurðar, har tann “ósjónliga” bakhurðin kann latast upp, og eingin mittarstólpi er millum hurðarnar. Hetta ger, at bilurin er sera arbeiðsligur,



*Mazda BT-50 undir “ekstremum” koyriumstøðum*

og lætt er at handfara arbeiðsamboð ella hvat tað skal vera inn og út úr kabinuni. Double Cab 4x4 hevur størstu kabinuna við tveimum røðum av setrum og fýra síðuhurðum - sum á einum vanligum persónbili. Er væl egnaður sum mannskapsbilur ella hjá teimum sum hava brúk fyri stórari kabinu og last.

Vit hava royndarkoyrt BT-50 undir “ekstremum” koyriumstøðum í Grikkalandi á eini breyt, sum er gjørd til royndarkoyring av slíkum akførum. Bilurin kláraði seg væl og kom fram allastaðni. Eingir trupulleikar við at klára seg gjøgnum næstan óframkomiligu koyriumstøðurnar.

Frá Bilasøluni í Hoyvík verður sagt, at teir hava Mazda BT-50 í teimum ymisku útgávunum, sum øll eru vælkomin at síggja og royna. Prísirnir byrja við kr. 217.000,-










